# Akfarstrygd
# tryggingartreytir

TRYGD

nr. 1-02

www.trygd.fo

# Innihaldsyvirlit

**Tryggingartreytir fyri Akfarstrygd, ið eru galdandi saman við lógini um Tryggingar-avtalur.**


| A. | Alment | Síða |
|---|---|---|
| 1. | Stovnan av tryggingini og gildiskoma | 4 |
| 2. | Hvønn fevnir tryggingin um (tey tryggjaðu) | 4 |
| 3. | Hvar tekur tryggingin við (grøntkort skipanin) | 4 |
| 4. | Tryggingarskeið, uppsøgn og broyting | 4 |
| 5. | Rindan av tryggingargjaldi | 4 |
| 6. | Prístalsjavnan | 4 |
| 7. | Tryggingarskipan | 4 |
| 8. | Trygging við avsláttarskipan | 4 |
| 9. | Fastgjaldtrygging | 5 |
| 10. | Sjálvsábyrgd | 5 |
| 11. | Flyting, navna- og váðabroyting | 5 |
| 12. | Søla av bilinum, frámelding og innlating av nummarplátum | 5 |

| B. | Reglur um ábyrgdartrygging | Síða |
|---|---|---|
| 13. | Hvat fevnir ábyrgdartryggingin um | 6 |
| 14. | Hvat fevnir ábyrgdartryggingin ikki um | 6 |
| 15. | Regress (aftursóknarkrav) vegna ábyrgdarskaða | 6 |

| C. | Reglur um skrokk-/brunatrygging | Síða |
|---|---|---|
| 16. | Hvat fevnir skrokk-/brunatryggingin um | 7 |
| 17. | Hvat fevnir skrokk-/brunatryggingin ikki um | 7 |
| 18. | Bjargingartrygging uttanlands (SOS-skipanin) | 7 |
| 19. | Rættarhjálpstrygging | 7 |

| D. | Aðrar reglur fyri tryggingini | Síða |
|---|---|---|
| 20. | Náttúruvanlukkur, kríggj og kjarnorka v.m | 8 |
| 21. | Royndarkoyring | 8 |
| 22. | Kærustovnar | 8 |

| E. | Tá skaði hendir | Síða |
|---|---|---|
| 23. | Skaðafráboðan | 9 |
| 24. | Hvussu verður skaðin endurgoldin | 9 |

| F. | Ískoytistryggingar | Síða |
|---|---|---|
| 25. | Frískaði | 10 |
| 26. | Bilsakn | 10 |
| 27. | Stormskaði | 10 |
| 28. | Eyka útgerð | 10 |
| 29. | TRYGD Bilhjálp | 10 |
| 30. | Føraravanlukka | 12 |

# A. Alment

## 1. Stovnan av tryggingini

1.1 Tryggingin tekur við í teirri løtu, felagið góðkennir áheitan um trygging ella frá teirri løtu semja er um. Tekur tryggingin við í staðin fyri trygging í øðrum tryggingarfelag, tekur tryggingin við frá teirri løtu, tryggingin í hinum tryggingafelagnum heldur uppat.

## 2. Hvønn fevnir tryggingin um (tey tryggjaðu)

2.1 Tryggingartakarin og ein og hvør, sum við loyvi frá tryggingartakaranum brúkar bilin sum førari ella sum ferðafólk, er fevndur av tryggingini.

2.2 Verkstøð, umvælarar, sølufólk og onnur, sum hava bilin til umvælingar, tænastueftirlit, sølu ella í varðveitslu annars, eru einans fevnd av tryggingini, tá talan er um koyriskaðar, um koyringin kann sigast at røkja áhugamál tryggingartakarans.

2.3 Nýggjur eigari er fevndur av tryggingini í 3 vikur aftan á eigaraskiftið í tann mun, hann ikki er fevndur av aðrari trygging, sum hann sjálvur hevur teknað.

## 3. Hvar tekur tryggingin við

3.1 Ábyrgdartryggingin tekur við í Føroyum og í teimum londum, sum hava tikið undir við grøntkort-skipanini samsvarandi galdandi lóg um bilar í viðkomandi londum.

3.1.1 Tá koyrt verður í londum, sum ikki hava tikið undir við grøntkort-skipanini, skal serstøk ábyrgdartrygging teknast við markið. Í tílíkum førum tekur henda trygging einans við subsidiert (í aðru syftu).

3.1.2 Skrokktryggingin tekur við í Føroyum og í teimum londum, sum hava tikið undir við grøntkort-skipanini.

3.2 Felagið kann við 14 daga varningi broyta fulnaðin uttanlands uttan rættarvirknað fyri hinar partarnar av tryggingaravtaluni.

3.3 Nærri upplýsingar um, hvørji lond eru fevnd av grøntkort-skipanini, og um hvar grønt kort skal havast við, kunnu fáast frá TRYGD.

3.4 Felagið kann krevja gjald fyri at skriva út grøntkort og SOS-kort.

## 4. Tryggingarskeið, uppsøgn og broyting

4.1 Tryggingin er galdandi til hon skrivliga verður søgd upp av tryggingartakaranum ella felagnum við í minsta lagi 1 mánaða varningi, til tann fyrsta í mánaðinum.

4.2 Aftan á hvønn skaða hava bæði tryggingartakarin og felagið rætt til, í upp til 1 mánað eftir, at skaðin er gjørdur upp, at siga upp tryggingina við 14 daga varningi.

4.2.1 Harafturat kann felagið í upp til 1 mánað eftir, at skaðin er gjørdur upp, sum treyt fyri framhaldandi trygging, herða tryggingartreytirnar, sum t.d. hækka sjálvsábyrgdina ella umskipa gjaldið í serstaka gjaldsskrá í eitt ávíst tíðarskeið.

4.3 Tryggingin kann harafturat sigast upp av felagnum við 14 daga varningi, um so er, at serstakt gjald, sb. stk. 4.2.1, ella sjálvsábyrgd sb. stk. 10, ella útgoldið meirvirðisgjald ikki verður goldið sambært kravi.

## 5. Rindan av tryggingargjaldi

5.1 Tryggingargjaldið verður kravt inn við inngjaldingarkorti ella - eftir áheitan frá tryggingartakaranum - við Gjaldsskipanini. Fyrsta gjaldið fellur til gjaldingar, tá tryggingin kemur í gildi, og seinni gjøld falla ásettu gjaldsdagarnar.

5.2 Verður tryggingargjaldið ikki goldið rættstundis, verður áminningarskriv sent. Tryggingartakarin hevur skyldu til at rinda avgreiðslugjøld fyri áminningarskrivið.

5.2.1 Verður tryggingargjaldið framvegis ikki goldið, verður tryggingin strikað, og møguligur veðhavari og løgregla fáa fráboðan, til tess at nummarspjøldur kunnu verða tikin.

5.3 Er tryggingin farin úr gildi, av tí at tryggingargjald ikki er goldið, kann hon ikki setast í gildi aftur, fyrr enn eftirstøðan er goldin, og tá einans treytað av, at tryggingargjald verður goldið fyri alt árið komandi 2 árini.

## 6. Prístalsjavnan v.m.

6.1 Tryggingargjaldið, og aðrar upphæddir, sum ásettar eru í tryggingini, verða prísjavnaðar sambært teim kunngjørdu nýtiligu vísitølunum frá Hagstovu Føroya.

Verða ongi nýtilig almenn vísitøl kunngjørd, hevur TRYGD rætt til at prísjavna við øðrum grundarlagi. Grundarlagið er vísitølini fyri januar ársfjórðing, kalendarárið fyri, at tryggingin verður stovnað.

## 7. Tryggingarskipan

Tryggingin er teknað antin sum ein fastgjaldtrygging ella sum trygging við avsláttarskipan.

Er tryggingin teknað sum fastgjaldtrygging verður avsláttarstigið ikki broytt um ongin skaði er. Við skaða verður fastgjaldtryggingin broytt sambært treytunum fyri fastgjaldtrygging.

Er talan um trygging við avsláttarstigi, verður avsláttarstigið broytt, tá skaði hendur, ella um ongin skaði er, uttan so, at tryggingin er standandi á bíligasta stigi.

Tað sæst á tryggingarskjalinum, um tryggingin er teknað sum fastgjaldtrygging ella trygging við avsláttarskipan.

## 8. Trygging við avsláttarskipan

8.1 Fyri tryggingina eru galdandi hesi 5 avsláttarstig - avsláttarstig 0, 1, 2, 3 og 4.

Avsláttarstig 00 = Tryggingargjald 150% av avsláttarstigi 01
Avsláttarstig 01 = Tryggingargjald 100% av avsláttarstigi 01
Avsláttarstig 02 = Tryggingargjald 75% av avsláttarstigi 01
Avsláttarstig 03 = Tryggingargjald 56% av avsláttarstigi 01
Avsláttarstig 04 = Tryggingargjald 42% av avsláttarstigi 01

8.2 Tryggingargjaldið er roknað eftir vektini á bilinum og tí áramáli, tryggingartakarin kann skjalprógva, at hann hevur koyrt uttan skaða. Tó er byrjunarstigið 1, tá einki áramál kann prógvast.

8.3 Tá tryggingin hevur verið í gildi, og skaði hevur ikki tyngt tryggingina í tvey heil tryggingarár á rað, lækkar tryggingin við einum stigi - frá avsláttarstigi 1 til 2, 2 til 3 ella 3 til 4 frá fyrsta høvuðsfalldegi.

8.4 Hevur tyngjandi skaði verið, hækkar tryggingin við einum stigi fyri hvønn skaða frá fyrsta høvuðsfalldegi, eftir at skaðin er hendur - frá avsláttarstigi 4 til 3, 3 til 2, 2 til 1, 1 til 0 ella frá 4 til 1, tá fleiri tyngjandi skaðar hava verið í einum kalendaraári.

8.5 Sum tyngjandi skaði er at skilja skaði, ið hevur við sær útreiðslur fyri felagið.

## 9. Fastgjaldtrygging

9.1 Serlig krøv verða sett til tryggingartakaran, fyri at fastgjaldtrygging kann verða teknað.

9.1.1 Tryggingargjaldið er roknað eftir vektini á bilinum og treytin er, at tryggingartakarin og hjúnafelagi/sambúgvi hansara/hennara hava allar tryggingar teirra í TRYGD.

9.1.2 Ynskir tryggingartakarin at broyta tryggingina til at fevna um ein annan bil, metir felagið, hvørt tryggingin kann halda fram við tí gjaldi, sum er avtalað, ella um gjaldið skal broytast sambært vanliga tryggingargjaldi felagsins.

9.1.3 Er omanfyri nevnda treyt um, at tryggingartakari skal hava allar tryggingar sínar í TRYGD, ikki lokin høvuðsfalldagin, verður tryggingin broytt og teknað sum vanlig trygging við avsláttarskipan.

9.1.4 Gjaldið er fast. Hetta merkir, at tryggingargjaldið verður óbroytt, um ongin skaði er. Við skaða verður fastgjaldstryggingin broytt sambært treytunum fyri fastgjaldstrygging.

9.2 Tá skrokkskaði hendir, sum hevur við sær útreiðslur fyri felagið, hevur tryggingartakarin eina sjálvsábyrgd, sum sæst á tryggingarskjalinum. Verður akfarið lænt øðrum enn hjúnarfelaga/sambúgva, ið antin vegna aldur ella tí viðkomandi ikki hevur koyrt uttan at gera skaða, ikki hevði rætt til at tekna fastgjaldstrygging í TRYGD, hækkar sjálvsábyrgdin til tað dupulta.

## 10. Sjálvsábyrgd

10.1 Er tryggingin teknað sum trygging við avsláttarskipan, hevur tryggingartakarin eina sjálvsábyrd, sum sæst á tryggingarskalinum, av hvørjum skrokkskaða. Tó kann hægri sjálvsábyrgd vera ásett sambært stykki 9.2 og 19.3 (rættarhjálpstrygging).

10.1.1 Er tryggingin teknað sum fastgjaldtrygging verður sjálvsábyrgd kravd sambært stykki 9.2.

10.1.2 Avtala kann verða gjørd um hægri sjálvsábyrgd, og er hetta tá ásett í tryggingarskjalinum ella ískoyti til sama.

10.2 Verður sjálvsábyrgdin ikki goldin ásetta gjaldsdagin, verður áminningarskriv sent. Tryggingartakarin eigur at rinda avgreiðslugjald fyri áminningarskrivið.

Verður sjálvsábyrgdin framvegis ikki goldin, kann felagið siga tryggingina upp við 14 daga varningi og mótrokna í tryggingargjaldi, sum møguliga verður til avlops -sí stykki 4.3.

## 11. Flyting, navna- og váðabroyting

11.1 Skjótast tilber skal skrivlig fráboðan sendast felagnum:

11.1.1 Tá tryggingartakarin ella tann fasti brúkarin skifta bústað ella navn.

11.1.2 Tá váðin, sum nevndur er í tryggingarskjalinum, verður broyttur, t.d. til annan bil, nýtsla av bilinum og vekt.

11.2 Váðabroyting kann hava við sær broyting í tryggingargjaldinum, roknað frá tí at váðin er øktur ella uppsøgn av tryggingini.

11.3 Verður váðabroyting ikki fráboðað, kann hetta hava við sær, at rætturin til endurgjald heilt ella fyri ein part fellur burtur.

## 12. Søla, frámelding og innlating av nummarplátum

12.1 Verður tryggjaði bilurin avhendaður, fellur tryggingin beinanvegin burtur. Tryggingartakarin skal beinanvegin geva felagnum boð um avhendingina.

12.1.1 Tryggingin kann ikki flytast nýggja eigaranum.

12.1.2 Tryggingargjald, sum goldið er fyri tíðina eftir at tryggingin er farin úr gildi, verður afturgoldið.

12.2 Avsláttur fyri at koyra uttan at gera skaða kann innan 1 ár flytast frá trygging, sum er farin úr gildi, til nýggjan bil.

12.3 Kann bilurin ikki nýtast eina tíð, kunnu nummarspjøldrini latast Bileftirlitinum. Hetta tíðarskeið skal vera í minsta lagi ein mánað til longdar. Tryggingargjaldið verður tá hvílandi og fevnir um brunatrygging.

12.4 Tryggingaravtalan kann ikki flytast ella latast triðja manni. Óavgreiddir skaðar kunnu bert flytast ella latast triðja manni við góðkenning frá felagnum.

# B. Reglur um Ábyrgdartrygd

## 13. Hvat fevnir ábyrgdartryggingin um

13.1 Ábyrgdartryggingin fevnir um endurgjaldsábyrgd sambært ásetingum ferðslulógarinnar um skaða, elvdur av, at bilur verður nýttur sum akfar. Tá koyrt verður aðrastaðni enn í Føroyum - sí stykki 3.1 - svarar tryggingin fyri endurgjaldsábyrgd sambært teimum lógum og endurgjaldsupphæddum, sum galdandi eru í viðkomandi landi.

13.2 Felagnum er heimilað at gera semju um spurningin um endurgjald. Tryggingartakarin hevur skyldu til at geva felagnum fulltrú til sína vegna at føra møgulig rættarmál og samráðingar.

13.3 Umframt sjálvt endurgjaldið rindar tryggingin eisini álagdan málskostnað og rentu av endurgjaldinum.

13.4 Harafturat svarar tryggingin fyri ábyrgd førarans av persónskaða á tryggingartakaran, tá hesin ikki er førari av bilinum.

## 14. Hvat fevnir ábyrgdartryggingini ikki um

**Ábyrgdartryggingin svarar ikki fyri:**

14.1 Persónskaða á føraran. Harafturat svarar tryggingin ikki fyri skaða á lutir ella aðra ogn, sum eru ogn hjá førara, føstum brúkara, tryggingartakara, hjúnafelaga/sambúgva hansara/hennara, ella virki, sum hesi eiga heilt ella fyri ein part.

14.2 Skaða á viðfest akfar ella útbúnað.

14.3 Skaða, sum hendir, tá bilurin er útleigaður.

14.4 Skaða, sum hendir, tá bilurin er á verkstaði, hjá umvælara, sølufólki og øðrum, sum hava bilin til umvælingar, tænastueftirlit, sølu ella á annan hátt í varðveitslu, uttan so at koyringin kann sigast at hava verið neyðug til tess at røkja áhugamál tryggingartakarans.

## 15. Regress (aftursóknarkrav) vegna ábyrgdarskaðar

15.1 Felagið hevur regress móti føraranum av tryggjaða bilinum, um so er, at hesin hevur elvt skaðan við vilja, jbr. áseting ferðslulógarinnar um hetta.

15.2 Er skaði elvdur við grovum ósketni, verður, við atliti til skuldarmunin og umstøðurnar annars, gjørt av, um felagið skal hava regress, og tá í hvønn mun.

15.3 Felagið hevur regress viðvíkjandi skaðum, sum hendir eru, meðan bilurin hevur verið leigaður út uttan førara.

15.4 Felagið hevur regress móti viðkomandi, sum hevur ábyrgd fyri skaðanum, um so er, at felagið hevur havt skyldu til at rinda fyri ein skaða, sum tryggingin ikki fevnir um.

# C. Reglur um skrokk-/brunatrygging

## 16. Hvat fevnir skrokk-/brunatryggingin um

16.1 Skrokktryggingin svarar fyri ein og hvønn skaða og bilstuldur við teimum í stykkjunum 17.1 til 17.13 nevndu undantøkum.

16.2 Brunatryggingin svarar fyri skaða á bil, sum stendst av eldi, spreinging, skammlopi og av at snarljós slær niður við teimum í stykkjunum 17.1 til 17.13 nevndu undantøkum.

16.3 Útgerð, sum verksmiðja ikki hevur fest í bilin, verður endurgoldin við upp til kr. 10.000,00, íroknað íseting, arbeiðsløn og mvg (støðisár er 1999). Tó undantikið teir lutirnir sum eru nevndir í ískoytifulnaðunum fyri eykaútgerð.

16.4 Partar av bilinum ella útgerð til bilin er bert fevnt av tryggingini, um tað er fest í bilin, tvs. at tað ikki kann takast burtur uttan so, at amboð verða brúkt.

16.5 Niðanfyristandandi útgerð til bilin er tó fevnd av tryggingini, hóast ikki fest:

5 kasettubond ella 5 fløgur, súkkluhaldari, viðførisberi, vetrar-/summardekk.

## 17. Hvat fevnir skrokk/brunatryggingini ikki um

**Skrokk/brunatryggingin fevnir ikki um:**

17.1 Vanligt slit. Stormskaðar á lakk og skaðar á lakki vegna steinslag. Virðisminkan av bilinum vegna aldur og nýtslu - herímillum slit, tering av rusti, lakkskaðar vegna steinslag og skøvur í rútum.

17.1.1 Útgerð sum annars er nevnd í ískoytisfulnaði fyri eykaútgerð.

17.2 Skaða, sum einans er í og er avmarkaður til mekanisku og elektrisku lutirnar (t.d.motor, gervisskipan, stýrislutir, og elektronisku stýri og eftiransingarskipan). Tryggingin fevnir tó um hesar skaðar, um so er at skaðin hevur staðist av eldi, stuldri, herverki ella av tí at snarljós slær niður.

17.3 Skaða ella bilstuldur, meðan bilurin er latin verkstaði, umvælara, sølufólki og øðrum, sum hava bilin til umvælingar, tænastueftirlits, sølu ella á annan hátt í varðveitslu. Tryggingin fevnir tó um hesar skaðar, um so er at skaðin er íkomin, tá koyrt verður, av eldi ella í maskinvaskarii, sí stykki 2.2.

17.4 Skaða, sum kemur á bilin undir umvæling, ella tá arbeitt verður upp á hann, antin tað er á verkstaði ella privat.

17.5 Skaða, sum stendst av koyring við ov lítlum vatni ella olju, og skaða sum stendst av frostspreinging.

17.6 Skaða, sum hendir, tá bilurin er leigaður út.

17.7 Biltelefon, fartelefon, walkie-talkie, telefaks, GPS, sjónvarp og líknandi ljóð-og sjónútgerð umframt útgerð, sum hoyrir til.

17.8 Miss og stuldur av brennievni.

17.9 Útleigubil og virðisminkan.

17.10 Skaða sum er elvdur við vilja, við grovum ósketni, ella tá førarin koyrir ávirkaður av rúsdrekka, heilivági ella narkotika, sí §18 og 20 í tryggingaravtalulóguni.

17.11 Skaðar, sum henda, tá tann, sum koyrir bilin, ikki hevur lógarásett koyrikort.

17.12 Skaða, sum stendst av, at bilurin hevur eitt ella fleiri niðurslitin dekk.

17.13 Tryggingartakarin er tó fevndur av tryggingini, tá talan er um skaðatilburðir, sum nevndir eru undir stykkjunum 17.10 til og við 17.12, um so er, at tryggingartakarin ikki koyrdi bilin og ikki visti, at talan var um nevndu umstøður, treytað av, at tað ikki var av grovum ósketni, at hann ikki visti um hesi viðurskifti.

17.13.1.1 Tryggingartakarin er tó ikki fevndur av tryggingini í hesum førum: Tá hjúnafelagi/sambúgvi tryggingartakarans var førari.

17.13.1.2 Tá onkur av børnum tryggingartakarans, sum búgva heima, var førari.

17.13.1.3 Tá tann, sum sambært tryggingarskjalinum er fastur brúkari, var førari.

17.14 Hevur felagið havt skyldu til at rinda endurgjald fyri ein skaða, sum ikki er fevndur av skrokk-/brunatryggingini, hevur felagið regress móti skaðavoldaranum, sum hevur ábyrgdina.

## 18. Bjargingartrygging uttanlands (SOS-skipanin)

18.1 Tryggingin tekur bert við, um skrokktrygging er teknað (ikki einans ábyrgdar-og/ella brunatrygging).

18.2 Tryggingin fevnir um persón- og vørubilar við loyvdari heildarvekt upp til 3,5 tons umframt viðfestivognar/húsvognar til tílíkar bilar.

18.3 Nágreiniligu treytirnar fyri bjargingartrygging uttanlands standa í tí reyða SOS-tænastukortinum, sum kann bíleggjast frá felagnum.

## 19. Rættarhjálpartrygging

19.1 Rættarhjálpstryggingin er tengd at skrokktryggingini fyri bilin. Er einans teknað ábyrgdar- og/ella brunatrygging fyri bilin, er ongin rættarhjálpstrygging.

19.2 Fulnaður verður veittur sambært tryggingartreytunum fyri rættarhjálpstrygging, sum »Dansk Forsikring og Pension« ásetur fyri øll tryggingarfeløg. Tryggingartreytirnar verða útflýggjaðar eftir áheitan.

19.3 Alment kann sigast, at rættarhjálpstryggingin fevnir um ein part av útreiðslum tryggingartakarans í sambandi við ávísar ósemjur, ið tryggingartakarin sum eigari, brúkari ella førari av skrokktryggjaða bilinum er partur í. Endurgjaldið kann í mesta lagi vera kr. 75.000,00, og sjálvsábyrgdin er 10% av útreiðslunum - tó í minsta lagi kr. 2.500,00.

19.4 Fyri at fáa rættarhjálp skal tryggingartakarin seta seg í samband við advokat. Heldur advokaturin, at møguleiki er fyri at fáa rættarhjálp, skal advokaturin biðja felagið um at veita rættarhjálp tryggingartakarans vegna, og skal felagið síðani taka endaliga støðu. Í sambandi við, at advokaturin skal meta um møguleikarnar fyri fríari rættarførslu, skal tryggingartakarin lata advokatinum skattauppgerð fyri seg sjálvan og hjúnarfelaga/-sambúgva.

# D. Aðrar reglur fyri tryggingina

## 20. Náttúruvanlukkur, kríggj og kjarnorka v.m.

20.1 Tryggingin fevnir ikki um skaðar, sum eru elvdir av kríggi, uppreistri ella borgaraligum ófriði umframt jarðskjálvta og øðrum órógvandi náttúrufyribrigdum.

20.1.1 Tryggingin tekur tó við, um tílíkir tilburðir henda í tí landi - smb. stykkini 3.1 og 3.2 - har tryggjaði er á ferð uttan fyri Føroyar í upp til 1 mánað, eftir at støðan hevur tikið seg upp.

Tað er ein treyt, at tryggingartakarin ikki koyrir í landi, sum er rakt av tilburðum sum teir nevndu.

20.2 Tryggingin tekur ikki við skaðum, sum eru elvdir av kjarnorku.

## 21. Royndarkoyring

21.1 Tryggingin fevnir um skaða, sum hendir undir royndarkoyring ella venjing til royndarkoyring, treytað av:

At koyrt verður í Føroyum.

At løgreglan hevur givið loyvi til einstøku koyringarnar, um loyvi krevst.

At ásettu koyrireglurnar verða fylgdar.

21.2 Tryggingin fevnir ikki um skaða, sum hendir undir lendis-, kapp- og rasarakoyring ella venjing til tílíka koyring, umframt alla koyring á breyt ella øki, sum er avbyrgt til endamálið.

## 22. Kærustovnar

22.1 Stendst ósemja um støddina á endurgjaldinum, kann endurgjaldið ásetast av gerðarrætti.

22.1.1 Tryggingartakarin og felagið velja hvør sín metingarmann sum umboð í gerðarrættin. Áðrenn farið verður undir málið, velja metingarmenninir ein ástøðumann, sum kemur uppí, um teir ikki kunnu semjast, og sum ásetur endurgjaldið innanfyri teir karmar, sum metingarmenninir hava ásett.

22.1.2 Gerðarrætturin ger av, um og í hvønn mun málskostnaðurin skal býtast millum partarnar.

22.1.3 Gerðarrættarúrskurðurin er endaligur og bindandi fyri tryggingartakaran og felagið. Hetta merkir, at hvørki tryggingartakarin ella felagið seinni kunnu leggja spurningin um støddina á endurgjaldinum fyri kærunevnd ella fyri rættin.

22.2 Felagið er tengt at:
»Ankenævnet for Forsikring«, sum er stovnsett av »Forbrugerrådet« og »DanskForsikring og Pension«.

22.2.1 Er ósemja millum felagið og tryggingartakaran um tryggingina, og er ikki nøktandi úrslit komið burturúr, hóast tryggingartakarin av nýggjum hevur vent sær skrivliga til felagið, kann tryggingartakarin kæra til:

Ankenævnet for Forsikring
Anker Heegaards Gade 2, 1. sal
1572 København V
Tlf. 33 15 89 00 - kl. 10.00 - 13.00.

22.2.2 Við kæruni skal sendast eitt kærugjald á postgirokonto hjá kærunevndini nr. 1199 - 9078630, og er gjaldið ein treyt fyri, at nevndin viðger kæruna. Gjaldið verður endurgoldið, um kærarin fær fult ella partvís viðhald í kæruni ella um kærunevndin vísir kæruni frá sær.

22.2.3 Kærur til kærunevndina skulu skrivast á serligt kærublað, ið fæst hjá:

Felagnum
Forbrugerrådet
Skrivstovu kærunevndarinnar.

22.3 Kæra til kærunevndina er ikki steðgandi, hvat viðvíkur møguligari rindan av sjálvsábyrgd og hækkaðum tryggingargjaldi.

# E. Tá skaði hendir

## 23. Skaðafráboðan

23.1 Hendir skaði, sum tryggingin fevnir um, skal tryggingartakarin beinanvegin senda felagnum skrivliga skaðafráboðan.

23.1.1 Skaðafráboðanin skal so gjølla sum tilber lýsa skaðatilburðin, og hvør skaði er hendur. Fráboðanin skal skrivast á skaðafráboðanarblað, sum fæst hjá felagnum og á www.trygd.fo

23.1.2 Felagið kann vísa frá sær skrokkskaðar, um felagið ikki hevur móttikið fráboðan um skaðan í seinasta lagi 14 dagar aftan á skaðadagin.

23.2 Ferðsluóhapp skal fráboðast løgregluni beinanvegin. Eisini skulu stuldurs- og herverksskaðar fráboðast løgregluni.

23.3 Avtalur um umvæling ella endurgjaldskrav mega ikki verða gjørdar uttan samtykki felagsins.

23.4 Er skaðin minni enn møguligur avsláttarmissur, fær tryggingartakarin tilboð um sjálvur at rinda skaðan móti at galdandi avsláttarstig verður varðveitt.

## 24. Hvussu verður skaðin endurgoldin

24.1 Felagið kann antin endurrinda skaðan kontant ella lata bilin umvæla.

### 24.2 Umvæling

24.2.1 Felagið hevur rætt til at gera av, hvar skaðin skal sýnast og umvælast.

Felagið kann ikki ábyrgdast fyri brek við arbeiðinum, sum verkstaðið hevur ábyrgdina av.

Farast kann ikki undir umvælingina, og umvælingin kann ikki fremjast uttan samtykki frá felagnum.

24.2.2 Hevur umvælingin við sær, at bilurin verður í betri standi enn frammanundan (t.d. vegna tering ella slit), skal tryggingartakarin sjálvur rinda tann partin av umvælingarútreiðslunum, sum svarar til virðishækkanina.

24.2.3 Verður umvælingin gjørd uttan fyri vanliga arbeiðstíð, rindar felagið ikki tær eykaútreiðslur, sum hetta hevur við sær.

24.2.4 Felagið rindar einans fyri umvæling av skaddu lutunum.

Sum dømi kann nevnast, at felagið ikki endurrindar fyri litbrigdi aftaná lakering ella mun á felgum aftaná umvæling ella útskifting av eini ella fleiri felgum.

Tryggingin hevur ikki ábyrgdina av, at eykalutir, sama slag sum teir skaddu, ikki kunnu útvegast.

Lækkar handilsvirðið á bilinum av umvælingini ella skaðanum, verður henda virðislækking ikki endurgoldin.

### 24.3 Flutningsútreiðslur

24.3.1 Felagið rindar neyðturviligar flutningsútreiðslur til næsta góðkenda verkstað treytað av, at talan er um skaða, sum er fevndur av tryggingini.

24.3.2 Verður bilurin stolin, rindar tryggingarfelagið neyðturviligar flutningsútreiðslur til heimstað hansara.

### 24.4 Kontantendurgjald

24.4.1 Verður skaðin endurgoldin kontant, verður endurgjaldið ásett til ta upphædd, sum ein bilur av sama merki, aldri og standi kundi fingist fyri móti gjaldi í hondina.

24.4.2 Tá talan er um stuldur, er tað ein treyt, at bilurin ikki verður funnin aftur innan 4 vikur eftir, at felagið og løgreglan hava fingið fráboðan um stuldurin. Tað er ein treyt, at fráboðanin til felagið er skrivlig.

24.4.3 Hevur felagið goldið endurgjaldið kontant, er bilurin ogn felagsins.

### 24.5 Nývirðisendurgjald

24.5.1 Fyri persónbilar, skrásettar til privata persónkoyring - tó ikki langtíðarleigaðar bilar-verður goldið eitt endurgjald, sum samsvarar prísinum fyri ein nýggjan bil av sama merki, slagi og árgangi, við møguligum avsláttarfrádrátti, sum felagið kann fáa, sum tann skaddi, treytað av:

24.5.2 At skaðin er íkomin innan fyri fyrsta árið eftir, at bilurin er skrásettur.

24.5.3 At bilurin var nýggjur, tá tryggingin varð teknað ella broytt.

24.5.4 At umvælingarútreiðslurnar eru í minsta lagi 50% av nývirðinum á bilinum, tá skaðin hendi.

### 24.6 Meirvirðisgjald (mvg)

24.6.1 Fyri bilar, sum eru ogn hjá meirvirðisskrásettum tryggingartakarum, eru hesar treytir galdandi:

24.6.2 Kann tryggingartakarin rokna meirvirðisgjaldið upp í inngangandi gjaldið, rindar felagið meirvirðisgjaldið soleiðis, at tað verður flutt umvælaranum. Tryggingartakarin hevur síðani skyldu til at endurrinda felagnum meirvirðisgjaldið. Sí eisini stykki 4.3.

24.6.3 Tá endurgjaldið verður latið kontant, verður meirvirðisgjaldið drigið frá endurgjaldinum.

# F. Ískoytistryggingar

**Ískoyti til tryggingartreytirnar fyri biltrygging nr. 1 - 02.**
**Á tryggingarskjalinum sæst, um tryggingin er víðkað við ískoytisfulnaði.**

## 25. Fríska**ð**i

25.1 Sjálvsábyrgd verður ikki roknað, tá talan er um hesar skaðar:

25.1.1 Eld, spreinging, skammlop ella skaða av, at toran slær niður.

25.1.2 Stuldur av og úr stongdum bili og roynd viðvíkjandi sama.

25.1.3 Røð av herverki, ið er at skilja sum skaðar elvdir í óndari ætlan á 2 ella fleiri bilar í sama øki og innanfyri sama tíðarbil.

25.1.4 Skaðar, sum eru elvdir av lutum, ið detta niður/oman, t.d. lutir, sum fúka niður av einum húsi. Tað at lutir fara um koll - t.d. súkklur ella aðrir lutir - er ikki at meta sum omandotnir.

25.1.5 Umvæling av skaðum sum henda á fram-, bak- og síðurútar, umframt á spegl og lyktir á tí tryggjaða akfarinum. Tó er ein sjálvsábyrgd galdandi, tá nevndu lutir vera útskiftir. Sjálvsábyrgdin sæst á tryggingar-skjalinum.

25.1.6 Omanfyri nevndu skaðar hava heldur ikki ávirkan á stig

**25.2 Endurgjald fyri virðislækking**

25.2.1 Fer umvælingarkostnaðurin fyri ein skaða, sum er fevndur av teknaðu tryggingini, upp um 30% av prísinum fyri ein nýggjan bil av sama merki og slagi, verður endurgjald fyri virðislækking goldið eftir hesum reglum:

25.2.2 15% av umvælingarkostnaðinum, um so er, at skaði stendst á bilin 3 tey fyrstu árini eftir fyrstu skráseting.

25.2.3 5% av umvælingarkostnaðinum, um so er, at skaði stendst á bilin 4. ella 5. árið eftir fyrstu skráseting.

25.2.4 Endurgjald fyri virðislækking verður ikki latið, um so er, at skaði stendst á bilin 6 ár ella seinni eftir fyrstu skráseting.

**25.3 Vanlig sjálvsábyrgd í sambandi við útlán**

25.3.1 Sjálvsábyrgd í sambandi við útlán av bili er tann sama, sum var tryggingartakarin sjálvur førari av bilinum.

## 26. Bilsakn

26.1 Fulnaðurin gevur rætt til endurgjald fyri bilsakn til leigu av øðrum bili ella fyri nýtslu av almennum ferðasambandi, meðan bilurin er á verkstaði í sambandi við skaða, sum er fevndur av biltryggingini. Endurgjaldið kann tó ongantíð fara út yvir teir dagarnar sýnsmetanin ásetur.

26.2 Er bilurin heilskaddur, verður endurgjald fyri sakn útgoldið til skaðaendurgjaldið er goldið, treytað av at tryggingartakarin hevur latið inn øll viðkomandi skjøl.

26.3 Fulnaður fyri bilsakn er í mesta lagi kr. 300,00 um dagin.

26.4 Fulnaðurin, tá bilurin er til umvælingar, er í mesta lagi kr. 4.200 fyri hvønn skaðatilburð.

26.5 Fulnaður fyri bilsakn, tá bilurin er stolin, og endurgjald fyri stuldur verður veitt er í mesta lagi 30 dagar, sambært pkt. 24.4.2

## 27. Stormskaði

27.1 Er talan um stormskaða skulu fleiri støkk vera á skadda lutinum, sum týðiliga stava frá somu hending, annars er talan um steinsløg, sum ikki eru fevnd av tryggingini.

27.2 Glas verður ikki skift av kosmetiskum orsøkum, bert um tað er brotið.

27.3 Niðurskriving av endurgjaldi í sambandi við lakkskaðar, har skaðaorsøkin er stormskaði:

| | | |
|---|---|---|
| **0 - 1** ár ella koyrt upp til | - | 100% |
| **1 - 2** ár ella koyrt upp til | 40.000 km | 90% |
| **2 - 3** ár ella koyrt upp til | 60.000 km | 80% |
| **3 - 4** ár ella koyrt upp til | 80.000 km | 70% |
| **4 - 5** ár ella koyrt upp til | 100.000 km | 60% |
| **5 - 6** ár ella koyrt upp til | 120.000 km | 50% |
| **6 - 7** ár ella koyrt upp til | 140.000 km | 40% |
| **7 - 8** ár ella koyrt upp til | 160.000 km | 30% |
| **8 - 9** ár ella koyrt upp til | 180.000 km | 20% |
| **9 - 10** ár ella koyrt upp til | 200.000 km | 10% |

Endurgjald verður veitt við ávísum lutfallsligum % eftir aldrinum á bilinum, ella hvussu nógv bilurin hevur koyrt.

## 28 Eyka útgerð

28.1 Niðanfyrinevnda eykaútgerð er tryggjað við upphædd, ið stendur tilskilað í tryggingarskjalinum. Tryggingin fevnir um vanligan skrokkskaða, tó eru undantiknir skaðar sum henda, tí at akfarið tekur í vegin, kantsteinar ella lutir sum liggja á vegnum. Sjálvsábyrgdin sæst á tryggingarskjalinum.

- Alufelgur
- Serligar lakkeringar
- Lækkingarútgerð
- Spoilarar og spoilarasett
- Gáttir

## 29. TRYGD Bilhjálp

## A. Hjálp, tá persónbilurin er uppsteðgaður

### 29.1 Hvat fevnir tryggingin um

29.1.1 Tryggingin fevnir um útreiðslur til kranabil, tænastuakfar, veghjálp, hjálp til at seta bilin í gongd o.l. í sambandi við ferðsluóhapp um bilurin er koyrdur fastur, motorsteðg, o.l. við tí persónbili, sum tryggingin sambært tryggingarskjalinum fevnir um, íroknað húsvogn ella tjaldvogn, um hesir eru festir í bilin.

29.1.2 Kann akfarið ikki gerast aftur á staðnum ella á næsta verkstaði, fevnir tryggingin um flutning av akfarinum til bústaðin ella til ein góðkendan verkstað.

29.1.3 Tryggingin fevnir um útreiðslur til flutning av ferðafólki í bilinum í sama mun sum fyri flutning av bilinum.

### 29.2 Hvat fevnir tryggingin ikki um

29.2.1 Tryggingin fevnir ikki um nýtslu av eykalutum, olju, brennievni og arbeiðsløn í sambandi við umvæling av brekinum, tað veri seg á staðnum, har óhappið hendi, ella á verkstaði. Kann skaðin ella brekið fyribils ella endaliga gerast aftur á staðnum, rindar TRYGD tó arbeiðslønina í tí sambandi. Útreiðslurnar til møguliga seinni endaliga umvæling av skaðanum ella brekinum eru ikki fevndar av tryggingini.

29.2.2 Tryggingin tekur ikki við, um so er, at útreiðslurnar eru fevndar av aðrari trygging t.d. skrokktrygging, flutningstrygging ella ábyrgdartrygging hjá skaðaelvara.

## B. Hámarksfulnaður

### 29.3 Endurgjald sambært TRYGD Bilhjálp kann í mesta lagi vera kr. 50.000,00 um árið.

### 29.3.1 Hvussu biðið verður um hjálp

29.3.2 Hjálp her á landi

29.3.3 Biðið verður um hjálp her á landi við at ringja til Skaðatænastuna hjá TRYGD

**Telefon 321312**

Skaðatænastan hjá TRYGD metir saman við tygum um tørvin á hjálp, og hvussu hjálpin best verður veitt út frá galdandi umstøðum. Talan kann vera um hjálp frá Tórshavnar Sløkkiliði, bilverkstaði á staðnum, bensinstøð ella bileigara á staðnum. Í serstøkum føri kann eisini vera talan um hjálp frá privatfólki.

29.3.4 Hjálp uttanlands

29.3.5 Uttanlands kann biðjast um hjálp við at ringja til

**Falck Euroservice**
**Telefon (+) 45 79 42 42 42**

29.3.6 TRYGD Bilhjálp er ein tryggingarfulnaður. TRYGD Bilhjálp endurrindar útreiðslurnar fyri hjálp, sum er fevnd av tryggingini, og hevur til endamáls í mest møguligan mun at veita neyðugu hjálpina.

### 29.4 Fráboðan av útreiðslum

29.4.1 Hava tygum fingið rokning fyri flutningin ella hjálpina, skal rokningin sendast felagnum, vísandi til tryggingarskjalsnummar og við frágreiðing um gongdina.

29.4.2 Hava tygum goldið kontant fyri hjálpina, verður kvittaða rokningin send felagnum vísandi til tryggingarskjalsnummar og við frágreiðing um gongdina. Upplýsast skal konto nr. har peningurin skal flytast á.

29.4.3 Hava tygum onga rokning fingið, verður stutt frágreiðing um gongdina send felagnum vísandi til tryggingarskjalsnummarið og við upplýsing um, hvat er goldið fyri flutning ella hjálp.

### 29.5 Rindan ella endurrindan av útreiðslum

29.5.1 Skjótast tilber, eftir at felagið hevur móttikið eina rokning, verður hendan goldin samsvarandi tryggingartreytunum.

29.5.2 Skjótast tilber, eftir at felagið hevur móttikið skjalprógv fyri útreiðslu, sum er goldin, fær tryggingartakarin peningin fluttan á upplýsta kontonr. til rindan av útreiðslunum samsvarandi tryggingartreytunum.

## C. Vanligar reglur fyri tryggingini

### 29.6 Hvat og hvønn fevnir tryggingin um

29.6.1 Tann tryggjaða persónbilin. Førari og ferðafólk í bilinum eru einans fevnd av tryggingini, sum ásett frammanfyri undir 29.1.3.

### 29.7 Hvar tekur tryggingin við

29.7.1 Tryggingin tekur við í Føroyum og í hesum londum í Europa: Danmark, Belgia, Eysturríki, Finland, Frankaríki, Holland, Írland, Italia, Luxemburg, Noreg, Póland, Portugal, Slovakia, Spania, Stórabretland, Sveits, Svøríki, Tjekkia, Týskland og Ungarn. (Danmark fevnir ikki um Føroyar og Grønland)

29.7.2 Tá koyrt verður í Danmark og uttanlands annars, eru fulnaðurin sambært TRYGD Bilhjálp tann sami, sum fulnaðurin sambært vanligum "Falck privatbil-abonnement".

### 29.8 Tryggingarskeið og uppsøgn

29.8.1 Tryggingin er teknað fyri 1-ára skeið og er galdandi, til hon skrivliga verður søgd upp av einum av pørtunum við í minsta lagi einum mánaða varningi til endan á einum tryggingarskeiði.

29.8.2 Eftir eina og hvørja fráboðan um útreiðslu, hava bæði tryggingartakarin og felagið, í upp til 14 dagar eftir rindan av endurgjaldinum ella noktan fyri at rinda, rætt til at siga upp tryggingina við 14 daga varningi.

29.8.3 Harafturat kann felagið eftir eina og hvørja fráboðan um útreiðslu - sum treyt fyri at halda fram við tryggingini - herða treytirnar fyri tryggingina við t.d. sjálvsábyrgd í nærri ásett tíðarskeið.

### 29.9 Rindan av tryggingargjaldi

29.9.1 Fyrsta tryggingargjaldið fellur til gjaldingar, tá tryggingin kemur í gildi, og seinni tryggingargjøld falla ásettan gjaldkomudag.

29.9.2 Tryggingargjaldið verður goldið við giro ella - eftir áheitan frá tryggingartakaranum - við Gjaldskipanini.

29.9.3 Saman við tryggingargjaldinum kann krevjast eitt umsitingargjald, sum tryggingartakarin hevur skyldu til at rinda.

29.9.4 Verður tryggingargjaldið ikki goldið rættstundis, sendir felagið áminning um rindan av gjaldinum. Í hesi áminning verður upplýst, at fulnaðurin sambært tryggingini heldur uppat, um so er, at gjaldið ikki er goldið í seinasta lagi 14 dagar eftir, at áminningin er send.

29.9.5 Hevur felagið sent eina áminning, hevur tað rætt til at krevja umsitingargjald.

### 29.10 Prísjavnan

29.10.1 Tryggingargjaldið verður prísjavnað sambært tí lønartali, sum Hagstova Føroya hvørt ár gevur út. Grundarlagið undir prísjavnanini er lønartalið fyri januar ársfjórðing í kalendaraárinum, áðrenn tryggingin tók við.

## E. Aðrar reglur fyri tryggingina

### 29.11 Annan bil og flutning

29.11.1 Felagið skal skjótast tilber hava skrivliga fráboðan, tá tryggingartakarin broytir búðstað, fær annan bil í staðin fyri tann, sum nevndur er í tryggingarskjalinum, ella gevst at hava bil.

## F. Kærustovnar

### 29.12 Ankenævnet for Forsikring

29.12.1 Møgulig trætumál millum tryggingartakaran og felagið kunnu skjótast inn fyri

**Ankenævnet for forsikring**
Anker Heegaards Gade 2
DK-1572 København V

Kærur til kærustovnin skulu sendast á serstøkum oyðiblað, sum fæst hjá felagnum ella á skrivstovuni hjá kærustovninum. Tryggingartakarin rindar gjaldið til Kærustovnin.

## 30. Tryggingartreytir fyri Føraravanlukka

### 30.1 Tryggingin fevnir um:

30.1.1 Tryggingin fevnir um føraran av privatbili, sum er skrokk- ella ábyrgdartryggjaður í TRYGD.

30.1.2 Tryggingin gevur rætt til endurgjald fyri vanlukkutilburð, sum er beinleiðis fylgja av ferðsluóhappi, tá tryggjaði er í bilinum. Sum ferðsluóhapp er eisini at meta skaði, sum hendir, tá farið verður í og úr bilinum.

30.1.3 Við vanlukkutilburð er at skilja ein brádlig hending, ið elvir til likamsskaða

30.1.4 Tryggingin fevnir um koyring í Føroyum og Norðurlondum og um ferðing og bráðfeingis steðg í upp til 6 mánaðir í hinum europeisku londunum.

### 30.2 Tryggingin fevnir ikki um:

30.2.1 Vanlukkutilburð, tá bilurin er leigaður út ella verður brúktur uttan vitan ella vilja tryggingartakarans ella skaða, sum hendir, tá bilurin verður nýttur til fólkaflutning móti gjaldi, ella skaða á fólk, ið sum lið í vinnu hevur bilin til sølu, umvæling, tænastu, flutning, í varðveitslu ella líknandi.

30.2.2 Vanlukkutilburður, sum stendst av náttúruvanlukku, kríggi, uppreistri, borgaraligum ófriði, ella sum er beinleiðis ella óbeinleiðis fylgja av útláti av kjarnorku ella geislavirkni.

30.2.3 Vanlukkutilburð, tá førarin er ávirkaður av rúsdrekka, rúsandi evnum, heilivági ella er ótilrokniligur, ella tilburð, sum tey tryggjaðu hava elvt til við vilja ella í grovum ósketni.

30.2.4 Skaða, sum stendst av sjúku ella sjúkligari støðu hjá tí skadda, og heldur ikki versnar av fylgjunum eftir vanlukkutilburð, sum stendst av sjúku ella sjúkligari støðu hjá skadda.

30.2.5 Undirlívsbrokk, hald í lendunum (lumbago), brostnar áraknútar og gø ella fylgjur av læknaviðgerð, uttan so at henda er gjørd í sambandi við skaða, sum gevur rætt til endurgjald.

30.2.6 Viðgerðar- og flutningútreiðslur.

### 30.3 Uppgerð av endurgjaldinum.

30.3.1 Tá vanlukkutilburður er beinleiðis orsøk til, at tryggjaði doyr innan 1 ár eftir vanlukkutilburðin, verður tryggingarupphæddin útgoldin hjúnafelaga tryggjaða ella - um eingin hjúnafelagi er - til lívsarvingar ella stjúkbørn, sum vóru yngri enn 25 ár, tá vanlukkan hendi. Eru eingi slík avvarðandi, verður goldið 2.000 í endurgjaldi.

30.3.2 Tá vanlukkutilburður hevur havt við sær, at arbeiðsevni tryggjaða varandi eru versnað, verður avlamnisendurgjald veitt. Við fult avlamni verður tryggingarupphæddin útgoldin, og við lutvíst avlamni verður endurgjald veitt í mun til avlamnið, um tað er í minsta lagi 5%.

30.3.3 Avlamnisstigið verður ásett við grundarlagi í niðanfyri standandi talvu. Tá avlamnisstigið verður ásett, er ásetingin einans grundað á, í hvønn mun fylgjurnar av vanlukkutilburðinum hava minkað um vanliga virkni likamsins uttan mun til serstakt starv.

30.3.4 Avlamni, sum var longu frammanundan vanlukkutilburðinum, gevur ikki rætt til endurgjald. Verandi avlamni kann ikki hava við sær, at avlamnisendurgjaldið verður sett hægri enn, um avlamnið ikki var frammanundan.

30.3.5 Avlamnisendurgjaldið verður ásett, so skjótt fylgjurnar av vanlukkutilburðinum kunnu gerast av endaliga, tó í seinasta lagi 2 ár eftir, at skaðin er hendur.

30.3.6 Er avlamnisendurgjald útgoldið, og hevur vanlukkutilburðurin við sær deyða 1 ár eftir tilburðin, verður einans útgoldin tann upphædd, sum deyðsendurgjaldið fer upp um rindaða avlamnisendurgjaldið.

## 30.4 Avlamnistalva

| | |
|---|---|
| Blindur báðum eygunum | 100 % |
| Mist annað eygað | 30 % |
| Mist sjónina á øðrum eyganum | 20 % |
| Skerd sjónarstyrki á øðrum eyganum við upp til einum triðingi | 5 % |
| Mist hoyrn á báðum oyrum | 50 % |
| Mist hoyrn á øðrum oyranum | 10 % |
| Mist allan armin | 80 % |
| Mist alla hondina | 75 % |
| Mist tummilin og millumhondina | 30 % |
| Mist tummilin | 25 % |
| Mist uttasta lið á tummlinum | 10 % |
| Mist fremstafingur | 15 % |
| Mist tveir teir uttastu liðirnar á fremstafingri | 12 % |
| Mist longutong ella lekifingur | 10 % |
| Mist tveir teir uttastu liðirnar á longutong ella lekifingri | 8 % |
| Mist lítlafingur | 10 % |
| Mist tveir teir uttastu liðirnar á lítlafingri | 8 % |
| Mist báðar føturnar | 100 % |
| Mist alt beinið | 85 % |
| Mist beinið omanfyri knæið | 75 % |
| Mist beinið í knæliðnum | 65 % |
| Mist fótin | 40 % |
| Mist allar tærnar á øðrum fótinum | 20 % |
| Mist stórutá og millumfótsbeinið | 10 % |
| Mist stórutá | 8 % |
| Traumatisk neurosa | 5 % |

Eru omanfyri nevndu likamslutir partvíst ónýtiligir ella partvíst mistir, verður avlamnið ásett lutfallsliga lægri. Við avlamni, sum ikki kann ásetast eftir omanfyri standandi talvu, verður avlamnisstigið ásett í mun til minkingina av evnunum at gera vanligt arbeiði, jbr. 30.3

## 30.5 Aldurslækking

Er tryggjaði fyltur 70 ár, tá vanlukkan hendir, verður endurgjaldið lækkað við 20% fyri hvørt byrjað ár eftir at tryggjaði hevur fylt 70 ár, soleiðis at ongin fulnaður er eftir at tryggjaði hevur fylt 74 ár.

## 30.6 Viðurskifti, tá skaði hendir

30.6.1 Verður krav sett fram um endurgjald eftir vanlukkutilburð, skal fráboðanarskjal og læknaváttan sendast tryggingarfelagnum skjótast tilber. Tryggjaði skal vera undir støðugari góðkendari læknaviðgerð, sum felagið hevur heimild til at eftirkanna, og tryggjaði hevur skyldu til at lata seg kanna av lækna, sum felagið tilnevnir.

30.6.2 Hevur vanlukkutilburðurin havt við sær deyða, skal fráboðan latast felagnum innan 48 tímar eftir tilburðin. Felagið kann krevja líkkanning.

30.6.3 Felagið rindar fyri tær váttanir, felagið krevur.

30.6.4 Í seinasta lagi 14 dagar eftir at tryggjaði er farin aftur til arbeiðis, ella eftir at neyðug læknaviðgerð er hildin uppat, ella so skjótt metast kann um varandi fylgjurnar, og í seinasta lagi 1 ár eftir vanlukkutilburðin, skal tryggjaði seta fram og grundgeva fyri endurgjaldskravi sínum móti felagnum.

30.6.5 Endurgjaldið verður útgoldið, tá endaliga upphæddin, sambært innsendum váttanum, kann ásetast.

30.6.6 Øll endurgjaldskrøv, sum felagið hevur havnað, detta burtur, um ikki stevnt er ella málið er skotið inn fyri Ankenævnet for Forsikring í seinasta lagi 6 mánaðir eftir, at avgerð felagsins er fráboðað viðkomandi skrivliga.

## 30.7 Ósemja um avlamni

30.7.1 Er ósemja um støddina á avlamninum, verður spurningurin avgjørdur av Føroya Vanlukkutryggingarráði ella Arbejdsskadestyrelsen í Danmark, hvørs avgerð er bindandi. Felagið leggur eftirkravisspurningin fyri Arbejdsskadestyrelsen. Arbejdsskadestyrelsen tekur eitt gjald fyri viðgerðina, sum verður goldið av tí parti, sum ikki fær viðhald í kravi sínum.

## 30.8 Rættindi

30.8.1 Rættindi hjá tryggjaða ella hjá teimum ið eftir sita, eru at meta sum persónlig rættindi, soleiðis at tey ikki kunnu avhendast ella vera fyri rættarsókn frá kravánarum.

## 30.9 Gildiskoma og tryggingarskeið:

30.9.1 Tryggingin kemur í gildi, samstundis sum skrokktryggingin av bilinum kemur í gildi og hon fylgir hesi trygging.

## 30.10 Prísjavnan

30.10.1 Tryggingarupphæddirnar verða ikki prístalsjavnaðar.

**P/F Trygd**
**Tryggingarfelag**

Oknarvegur 5
P.O. Box 44
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel +298 358 100
Fax +298 317 211
trygd@trygd.fo
www.trygd.fo

Trygd hugsar um teg

SENDISTOVAN